búst aðir
Føroya bústaðafelag

# Limatíðindi

nr. 2, 2014




## "Vit eru komin heim

Apríl 2014

# Væl á leið

Bústaðir eru saman við myndugleikum og áhugafeløgum farin undir at skapa nýggjar, kreativar og hóskandi bústaðarloysnir, soleiðis at bústaðarmarknaðurin verður meira fjøltáttaður.

Til summar hava vit leigubústaðir tøkar á Tvøroyri, í Skopun, í Leirvík, á Oyrarbakka, í Sørvági og í Tórshavn. Fyrstu verkætlanirnar standa longu lidnar á Tvøroyri og í Skopun, og fyrstu leigararnir eru fluttir inn. Ein teirra er Katrin Strøm, sum er við í hesari útgávu av blaðnum. Hinar íbúðirnar verða í løtuni bodnar út eftir okkara bíðilista. Allar okkara verkætlanir verða lýstar í blaðnum, og nágreiniligari kunning er á heimasíðu okkara.

Bíðilistin, sum er býttur út á sjey øki í Føroyum, gevur okkum eina ábending um, hvar skilabest er at byggja leigubústaðir. Tí hevur tað stóran týdning, at okkara limir skráseta seg á rættan hátt og bert í tí økinum, har teir ynskja at búgva. Bíðilistin er langur, men serliga í miðstaðarøkinum eru nógv fólk eru uppskrivað. Fyri at nøkta stóra tørvin í miðstaðarøkinum keyptu Bústaðir íbúðirnar á Heimasta Horni og gevur hetta okkum møguleika longu nú at bjóða okkara limum íbúðir í Tórshavn.

Vit eru eisini komin væl áleiðis við at fáa okkara nýggju skraddaraseymaðu KT-skipan at virka, og nú verður øll okkara umsiting stýrd við hesi skipan.

Nýggja KT-skipanin ger tað smidligari hjá okkum at veita skjóta og góða tænastu. Sum bústaðafelag eru vit nú til reiðar at taka í móti komandi avbjóðingunum.

Vit eru sera fegin um, at vit um stutta tíð hava út við 50 virkin leigumál, og vit gleða okkum til at fáa uppaftur fleiri.

Góðan lesnað!





## Dagførd kunning er altíð at finna á bustadir.fo

### Spurningar og ivamál

Hevur tú spurningar ella ivamál, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

### Samband

Send okkum eina teldupost á bustadir@bustadir.fo, ring til okkum á 401000 ella støkk inn á gólvið.

Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá klokkan 10 til 16 og fríggjadag til klokkan 15.

# Nummar 989 fekk triðju íbúðina

## Katrin Strøm, limur í Bústøðum

Katrin Strøm er saman við sínum trimum børnum flutt í eina av íbúðunum, ið Sp/f Roest hevur bygt fyri Bústaðir á Tvøroyri. Nakað, ið tyktist fjart, tá hon stutt fyri jól í fjør fekk boðini, at hon var nummar 989 á bíðilistanum.

Katrin ivaðist ikki í, at hon var millum tey fyrstu at skriva seg á bíðilistan, tá Bústaðir lýstu við, at nú bar til at skriva seg upp.

– Eg hugsaði, at hetta var virkuliga gott – at farið varð undir at broyta hugburðin hjá fólki frá at eiga til at leiga.

Og tað var ikki bert Katrin, ið var spent at síggja nýggju bygningina á Tvøroyri. Eisini børnini vóru sera spent. Tá ið skriv kom frá Bústøðum um, at hon var nummar 989 á bíðilistanum, var tó ikki væntandi, at tey fóru at fáa eina íbúð so skjótt, sum tey hóast alt fingu.

– Eg var nummar 989 á bíðilistanum, og har vóru bara tríggjar íbúðir, so sjálvt tá eg fekk at vita, at nú vóru bara 15 framman fyri meg, so væntaði eg einki og fortaldi einki fyri børnunum. Eg ringdi til Bústaðir tríggjar ferðir fyri at frætta nýtt, áðrenn tey so endiliga ringdu við góðu tíðindunum, at íbúðin stóð mær í boði.

### Vit eru komin heim

– Børnini vóru so glað og spent, at tey pakkaðu sama dag vit fingu boðini, tí tey ynsktu at flyta beinanvegin. Har var einki at bíða eftir.

Alt er nýtt, og eingin hevur búð í 103 fermetra stóru íbúðini áðrenn Katrin og hennara børn.

– Eg fari væl um og havi valt at keypa okkum nýggjar stólar, og har skulu dubbar undir, so vit ikki oyðileggja tað fína gólvið, sigur Katrin við einum brosi.

– Vit búgva ordiliga væl og hava bæði hjall og goymslurúm. Sonurin hevur egið kamar, og tvíburagenturnar hava kamar saman: onnur er á hemsinum og hin niðriundir, so tær hava gott pláss. Børnini smíla aftur um oyruni, og tað hevur alt at siga fyri meg sum mammu endiliga at kunna hvíla og njóta míni børn og mítt heim.

– Nú vit eru komin upp á pláss her á Heiðatrøðni, vænti eg, at vit ongantíð flyta út aftur. Her er gott at vera. Endiliga eru vit komin heim.



> " Børnini smíla aftur um oyrini

# Gongd komin á útleigingina

## Anja Thorleifsson, málsviðgeri í Bústøðum

At vera málsviðgeri á Bústøðum er fjølbroytt og spennandi, tí hvør dagur hevur nýggjar uppgávur og sínar avbjóðingar við sær.

Anja, sum hevur arbeitt í banka í 27 ár, byrjaði í november 2011 á táverandi Húsalánsgrunninum. Stutt eftir skifti stovnurin samleika og navn til Bústaðir – Føroya bústaðafelag. Anja arbeiddi fyrst við orkulánum, men fekk so í boði at arbeiða við leigubústøðunum.

– Tað er stuttligt at kunna ringja til fólk og fortelja, at tey fáa eina íbúð. At uppliva hesa gleðina hjá okkara limum gevur arbeiðinum meining. Tað er ein góð kensla at vera við til at geva fólki góðar og tryggar bústaðarmøguleikar. Herfyri fekk eitt par, sum býr í Danmark, boðið eina íbúð, og tey fara at flyta heim beinanvegin, tí tey hava fingið nakað at búgva í.

### Nummar 989 gjørdist nummar trý

Vit vísa í grein her í Limatíðindum á, at ein av okkara limum, sum var nummar 989, fekk eina íbúð sum nummar trý í Suðuroy. Hvussu letur tað seg gera, at nummar 989 á einum lista kann fáa eina íbúð, tá bara tríggjar eru at velja í?

– Samlaði bíðilistin við 1.850 limum er fyri alt landið. Av teimum eru 20 prosent hvílandi limir, og hesir fáa ikki tilboð um íbúðir. Tvey prosent av limunum høvdu ynskt íbúð í Suðuroy. Tað vísti seg, at summi teirra ynsktu eitt tilboð seinni ella eina minni ella størri íbúð. Tí komu vit upp til nummar 23, ið hevði valt Suðuroynna, áðrenn triðja íbúðin varð útleigað, fortelur Anja. Tá íbúðir verða bodnar út, fylgja vit bíðilistanum, tí tað er tað, sum er mest rættvíst.

Fleiri verkætlanir fara í gongd í Havn nú, men tað gongur helst eitt til hálvtannað ár, áðrenn hesar íbúðir verða tøkar. Tilboðið til limir í Bústøðum um at leiga á Heimasta Horni hevur gjørt, at Havnin er komin skjótari í gongd, enn Bústaðir væntaðu.

– Við Heimasta Horni hava vit eitt puslispæl, tí har eru so nógvar íbúðir, og okkara limir hava ymisk ynskir. Vit eru longu komin upp á limanummar 350, so tað gongur skjótt, sigur Anja við einum stórum smíli.






"Krøvini um bíligar íbúðir ávirka ikki góðskuna á okkara verkætlanum



# Nýggj og tíðarhóskandi bygging

## Jóan Petur Vang, byggiharri

Jóan Petur Vang hevur verið sjálvstøðugur síðan 1998 og hevur verið í byggivinnuni síðan 1989, tá hann gjørdist sveinur. Í dag starvast seks sveinar, tríggir royndir arbeiðsmenn, ein lærlingur, ein byggifrøðingur og eitt skrivstovufólk hjá Jóan Peturi. Felagið veitir totalenterprisu, frá tekningum og prosjektering til endaligu byggiuppgávuna.

Byggihættirnir eru nógv broyttir hesi 25 árini, Jóan Petur hevur virkað í byggivinnuni. Stórviðurin er tann sami, men er sverari, tí meira bjálving skal í, og takloysnir krevja ventilering í øllum yvirtromum. Vindeygu og hurðar eru betur bjálvað og hava lægri U-virði. Bjálvingin í dag ger tann størsta munin, og so dampsperran sjálvandi. Nú skulu fólk helst hava tikið dampsperruskeið fyri at lúka krøvini.

Bústaðir byggja á ein nýggjan og tíðarhóskandi hátt, og stórur dentur verður lagdur á fríøki. Hetta setir størri krøv og kann gerast dýrari, men vit royna at halda byggikostnaðinum niðri, soleiðis sum Bústaðir ynskja, sigur Jóan Petur.

At byggja býlingar er tað, sum Bústaðir stremba eftir, og hetta dámar Jóan Peturi væl. Tað skapar góð øki og størri møguleika at fáa trivnað millum grannar rundan um býlingin hjá Bústøðum.

### Treytir um góðsku

Øll bygging hjá Bústøðum skal lúka BR10 krøvini. Hetta merkir, at byggingin setir størri krøv til tættleika og bjálving. Hesin standardur krevur av okkum, at vit eru enn meiri nærlagdir, tí eftirkanningar verða gjørdar av øllum arbeiði við at trykkroyna íbúðirnar. Royndirnar hava víst, at bygningarnir lúka øll krøv í mun til BR10, staðfestir Jóan Petur.

Bústaðir ynskja at byggja so bíliga sum til ber, og við høgari góðsku. Tað krevur neyva planlegging, og við BR10 krøvunum er hetta ein uppaftur størri avbjóðing, men eisini spennandi, sigur Jóan Petur Vang.

Hetta er eisini galdandi fyri hitaskipanina. Íbúðirnar í dag hava allar hitapumpu ella jørðhita. Við at fylgja BR10 krøvunum slóða Bústaðir eisini fyri at byggja við grønari orku. Á Oyrarbakka til dømis hava allar íbúðir egna hita- og ventilatiónsskipan.

Krøvini um bíligar íbúðir ávirka ikki góðskuna á okkara verkætlanum, tí vit samstarva við øll lið um at loysa uppgávuna á dygdargóðan hátt. Sum totalentreprisa eru vit við í verkætlanini heilt frá byrjan, og soleiðis kenna vit øll krøv og ynskir og kunnu sostatt skapa góðar og haldgóðar loysnir, uttan at byggingin gerst ov kostnaðarmikil.

### Næstur verður Skansin

Skansaíbúðirnar í Havn eru okkara næsta verkætlan saman við Bústøðum. Vit er sera spent upp á Skansan, og eg haldi, at hetta verður flottasta ætlan av sínum slag í Føroyum. Arkitektoniskt eru íbúðirnar avbera spennandi. Flagtak, skeivir veggir, innskotið dekk í ovaru íbúðunum, karnappar og hálvtak. Har eru ikki nógvar beinar linjur, so tað verður ein avbjóðandi uppgáva at fara undir. Økið rundanum verður vakurt og fer at gera sítt til, at trivnaðurin verður góður, sigur Jóan Petur Vang at enda.



# Heimasta Horn Tórshavn

## Klárt at flyta inn hálvan mai

Heimasta Horn er longu ein livandi býlingur við 96 íbúðum, harav Bústaðir nú hava ognað sær 24 íbúðir. Talan er um Heimasta Horn nr. 36 og 38, ið eru vestastu íbúðarhúsini í býlinginum. Klárt er at flyta inn longu hálvan mai í ár.

## Millum náttúru og høvuðsstað

Íbúðirnar liggja undir Gráasteini, við Havnini øðrumegin og Havnardali við øllum sínum náttúruupplivingum hinumegin.

Tað er skjótt til bussin, ið koyrir teg oman í býin ella ávegis út í náttúruna. Rossagøtan, ið gongur tætt framvið, førir allan vegin niðan á Oyggjarvegin ella út til fjósini í Havnardali.



## Nútímans íbúðir

Íbúðirnar eru allar innrættaðar við duri, miðgongd, køki, stovu, baðirúmi, vaskirúmi og tveimum sovikømrum. Íbúðirnar eru málaðar, og gólvini eru úr eikiparkett. Í baði- og vaskirúminum er vinyl á gólvinum, og dururin er flísalagdur. Køkur er við hvítvørum, baðirúm við innbúgvi og kømur við klædnaskápi. Uttanfyri er rúmligt altan.

Ovastu íbúðirnar eru gjørdar úr fínari tilfari og hava betri góðsku á m.a. gólvi og hurðum. Ovastu íbúðirnar eru opnar upp í tróðrið og hava loftsljós.

Til hvørja íbúð hoyrir rúmligt goymslurúm í kjallaranum á 8–10 m².

### Fakta

**Íbúðir**
24

**Búvídd**
87 m², 102 m² og 105 m²
Goymslurúm 8–10 m²

**Rúm**
3

**Sovikømur**
2

**Innflyting**
Hálvan mai 2014




# **Undir Bjørgum** Oyrarbakki

Á Oyrarbakka, undir Bjørgum, hevur Sp/f Jóan Petur Vang bygt átta leiguíbúðir fyri Bústaðir.

Talan er um tvey íbúðahús við fýra íbúðum í hvørjum. Íbúðirnar eru í tveimum støddum.

Tær minnu íbúðirnar eru 82 m² við tveimum sovikømrum, og tær størru eru 92 m² við trimum sovikømrum. Felags fyri allar íbúðirnar er, at tær eru innrættaðar við stovu/køki, baðirúmi, gongd, goymslurúmi og felags millumgongd.

Orkukeldan er luft til vatn við hitapumpu og við gólvhita í øllum húsunum.

Tvær av íbúðunum kunnu nýtast av fólki, ið situr í koyristóli.

### Felags øki og spæliplláss

Felagsøki verður gjørt ímillum íbúðahúsini, har plantað verður, og eitt felags spælipláss verður bygt í samráð við grannarnar í gøtuni.

### Fakta

**Íbúðir**
8

**Búvídd**
82 m² og 92 m²
Goymslurúm 4 m²

**Rúm**
3 og 4

**Sovikømur**
2 og 3

**Innflyting**
Hálvan mai 2014

**Samstarvsfelagi**
Sp/f Jóan Petur Vang



# **Billubøur** Sørvágur

Í Sørvági byggir Sp/f Sørvágs Snikkaravirki fimm íbúðir fyri Bústaðir.

Íbúðirnar verða bygdar á Billubønum, mitt í bygdini, og hava vakurt útsýni yvir bygdina og sandin.

Íbúðirnar eru 85 m² til støddar, og harumframt er terrassa og ein lítil hjallur á 4 m² til hvørja íbúð.

Allar íbúðirnar kunnu nýtast av fólki í koyristóli, og tær verða innrættaðar soleiðis: køkur/stova, tvey sovikømur, baðirúm og gongd.

Íbúðirnar eru sera orkuvinaligar og uppfylla øll krøvini í BR10 byggiásetingini.

### Fakta

**Íbúðir**
5

**Búvídd**
85 m²
Hjallur 4 m²

**Rúm**
3

**Sovikømur**
2

**Innflyting**
Summar 2014

**Samstarvsfelagi**
Sp/f Sørvágs Snikkaravirki



# **Ranggil** Leirvík

Við Ranggil í Leirvík byggir MTM Bygging fimm íbúðir fyri Bústaðir.

Íbúðirnar eru í tveimum støddum, tvær á 63 m² og tríggjar á 78 m² og harafturat er ein hjallur á 3 m² til hvørja íbúð.

Tær minnu íbúðirnar eru innrættaðar við gongd, køki/stovu, baðirúmi og einum sovikamari.

Tær størru íbúðirnar eru innrættaðar á sama hátt, men hava tvey sovikømur. Terrassa er út frá køki/stovu í øllum íbúðunum.

### Fakta

**Íbúðir**
5

**Búvídd**
63 m² og 78 m²
Hjallur 3 m²

**Rúm**
2 og 3

**Sovikømur**
1 og 2

**Innflyting**
Hálvan mai 2014

**Samstarvsfelagi**
MTM Bygging



**Er útleigað**



# **Skúlavegur** Skopun

### Fakta

**Íbúðir**
2

**Búvídd**
60 m²

**Rúm**
3

**Sovikømur**
2

**Um íbúðina**
Eini eldri sethús, ið eru umbygd til tvær nútímans íbúðir.

**Innflyting**
Februar 2014

**Samstarvsfelagi**
Jákup Martin Sørensen

**Er útleigað**



# **Heiðatrøðin** Tvøroyri

### Fakta

**Íbúðir**
3

**Búvídd**
100 m²
Hjallur 3 m²

**Rúm**
4

**Sovikømur**
3

**Um íbúðina**
Nútímans íbúðir við góðum ljós-viðurskiftum. Uttanfyri er hjallur og steinløgd terrassa við hálvtaki.

**Innflyting**
Februar 2014

**Samstarvsfelagi**
Sp/f Svend Roest

norna.fo 512002

bústaðir
Føroya bústaðafelag

Yviri við Strond 6
Postsmoga 215
110 Tórshavn

Tel. +298 401000
bustadir@bustadir.fo
www.bustadir.fo